Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Starv sum útoyggjalærari í Fugloyar skúla

Starvið sum útoyggjalærari í Fugloyar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2008. Komandi skúlaár verður 1 næmingur í Fugloyar skúla.

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Fugloyar skúla.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2008.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, tlf. 355050.

Tórshavn, 2. juli 2008
Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

sansir.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við

# Brúktir húsvognar til sølu
www.stubbin.fo

# Brúktir bátar til sølu
www.stubbin.fo

## FRAMSÝNING í Smiðjuni í Lítluvík við fernisering



4. juli kl. 16.00, har Sámal Ravnsfjall kemur og spælir frá kl. 17.00 til 18.00

Framsýningin letur upp kl. 14.00 hvønn dag og letur aftur kl. 20.00 til og við 9. juli

**Øll eru hjartaliga vælkomin**
sovæl til fernisering sum hinar dagarnar

## Lærarastarv í Kaldbaks skúla
*(endurlýsing)*

Kaldbaks skúli søkir eftir einum lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2008/09 vegna avlopstímar og serligan tørv umleið 24-26 tímar um vikuna.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- eru fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- verða við áhaldandi at menna skúlan
- er stundisligur og nærlagdur

Skúlanum tørvar lærara, ið m.a. kann átaka sær at undirvísa í fleiri av hesum lærugreinum so sum donskum, enskum, heimstaðarlæru, kristni, náttúru og tøkni og rokning.

**Førleikakrøv:**
Tann, ið settur verður, skal hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja starvið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastarvið verður sett sum sáttmálasett starv. Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2. Starvið verður sett sum tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2008/2009.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v., avrit av prógvum og møguligum ummælum, skulu vera fyrstalærara Ragnari J. Magnussen, Hagagøtu 5 á Argjum, í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 18. juli 2008 kl. 12.00.**

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til: Kaldbaks skúla 515398 ella um teldupostadressuna kaldbak@skulin.fo.

**Kaldbaks skúli**
180 Kaldbak

Kaldbaks skúli hevur komandi ár um 30 næmingar úr 1. til 7. flokk. Á skúlanum starvast í løtuni 4 lærarar. Í 2003 varð skúlin høvuðsumvaldur og bygt varð afturat verandi skúla. Sera góðar hølisumstøður til næmingar og lærarar. Skúlin er væl útgjørdur við undirvísingaramboðum og -tilfari.